# Grønt (orku)skifti og fossilir hugsunarhættir

## Vísindavøka 27. september 2024

Ragnheiður Bogadóttir, ragnheidurb@setur.fo

# Grønt (orku)skifti og fossilir hugsunarhættir



+



=



*"Humans are very smart, but despite our wisdom we keep doing some very stupid things"* (Y.N. Harari)

# HEIMSMÁLINI
fyri burðardyggari menning

- Aðalfundarsamtykt Sameindu Tjóða “Transforming the world: the 2030 Agenda for Sustainable Development” frá 2015 heitir á heimsins tjóðir um at virka fyri at fremja 17 burðardygg menningarmál. Málini eru sett fyri tíðarskeiðið 2015 til 2030 og skulu seta eina greiða kós fram ímóti burðardyggari menning til gagns fyri bæði menniskju og náttúru.
- Endamálið er, at hvørt landið tekur útgangsstøði í egnum veruleikum og við egnum raðfestingum virkar fyri at fremja málini.
- Landsstýrið tekur undir við Heimsmálunum.



# Trífaldað umhvørviskreppa: Lívfrøðiligt margfeldi, dálking, veðurlagsbroytingar



# Umhvørvisárin av føroyska búskapinum (fyri hvønn íbúgva) sett í altjóða høpi

| **Ávísar** | **Føroyar** | **ES** | **Heimurin** |
|---|---|---|---|
| **Útlát**<br>í $CO_2$-eindum fyri hvønn íbúgva/ár (ár 2020) | 24 tons | 7,2 tons | 6,3 tons |
| **Rusk** (húsarhalds-)<br>fyri hvønn íbúgva/dag (ár 2021) | 3,4 kg | 1,3 kg | 0,75 kg |
| **Innlendis tilfarsnýtsla**<br>fyri hvønn íbúgva/ár (ár 2020) | 34 tons | 13,6 tons | - |

Skuldu Føroyar fylgt París-avtaluni, skuldi útlátið í miðal verið uml. **3-4 tons** fyri hvønn føroying í 2030.

Burðardygg tilfarsnýtsla er mett at vera uml. **8 tons** fyri hvønn heimsbúgva.

# Okkara samband við náttúru(tilfeingi) - Gongdin í innlendis tilfarsnýtslu í Føroyum

887.000 tons í 1998 = 18 tons fyri hvønn íbúgva

1.888.000 tons í 2020 = 34 tons fyri hvønn íbúgva



# Innlendis tilfarsnýtsla í longri søguligum samanhangi



# Elorkuframleiðsla í Føroyum – ímyndanir og veruleiki




Um vit ímynda okkum, at allur heimurin megnaði sama vøkstur í orkuframleiðslu sum Føroyar á t.d. **3%** árliga...

100 ár: framleiðslan økt 19 ferðir

200 ár: 369 ferðir

300 ár: 7099 ferðir

400 ár: 136424 ferðir

500 ár: 2621877 ferðir



# Avleiðingar av vantandi grønum (orku)skifti

- Vit gerast í størri og størri mun tengd at orku- og tilfeingisstreymum uttanífrá
- Vit minka um lívfrøðiliga margfeldið (okkara náttúrukapital)
- Vit dálka meir
- Føroyska samfelagið gerst minni burðardygt
- Føroyska samfelagið gerst minni mótstøðuført/haldført

Okkara vælferð og trivnaður veksur ikki í samsvari við vøksturin í orku- og tilfeingisnýtslu – kanska tvørturímóti.

Vit noyðast, fyrr ella seinni, at brúka okkara vitan til at minka um orku- og tilfeingisnýtslu. Tað vil siga, vit noyðast at fáa meira vælferð og trivnað burturúr minni orku- og tilfeingisnýtslu.

